# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*– Vit hoyhra dagliga, hvussu ymiskir kraddarabólkar innan tað almenna krevja meira og meir pengar til ymisk endamál, ið fyri tað mesta eru púra høpisleys*

*Jan Højgaard í lesarabrævið 10. januar í ár*

# Aðalstýrini eru nyttuleys

**Nýggi formaðurin í Fiskimannafelagnum, Jan Højgaard legði í lesarabrævið í Sosialinum 10. januar harðliga eftir sonevndum frøðingum og eftir aðalstýrunum. Hann skrivaði m.a.:**

*"Vit hoyra dagliga, hvussu ymiskir kraddara-bólkar innan tað almenna krevja meir og meir pengar til ymisk endamál, ið fyri tað mesta eru púra høpisleys"*

*"Hesir bólkar kalla seg frøðingar av ymsum slag, men fer ein at hyggja nærri at hesum fólkum og teirra grundgevingum, so er beinavegin, at ein gerst varugur við, at tað man vera so sum so við frøðini"*

*"Pengar verða kravdir til at granska fyri, til heilsufrøðiligu starvsstovuna, búskaparfrøðingar og løgfrøðingar krevja at verða settir í starv á onkrum av teimum nyttuleysu aðalstýrunum. Hesi fólk eru totalt uttan fyrilit og kosta tí føroyska samfelagnum í dýrar dómar. Hetta verður fyri tað mesta gjørt, fyri at fáa nakrar krónur uppá ein lættan máta"*

*"Tey, ið hava funnist mest at fiskimonninum, eru ofta tey, ið hava fingið mest frá honum. Hesi eru at meta við eina gapandi pisu, sum tekur móti føðini, fyri síðani at skvøtta hana út aftur í reiðrið. Hesar pisur verða ongantíð floygdar, men halda á fram við at dálka okkara reiður, Føroyar"*

# Á sera lágum støði

**Hóast Gunnleivur Dalsgarð formaður í Starvsmannafelagnum heldur útsøgnirnar hjá nýggja formanninum í Fiskimannafelagnum vera langt úti, er hann opin fyri at samstarva**


Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum

FAKFELØG
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum, heldur lítið um útsøgnirnar hjá nýggja formanninum í Fiskimannafelagnum um fólk í almennu umsitingini sum kraddarabólkar og gapandi pisur.

– Eg kann bara staðfesta, at Jan Højgaard leggur seg upp í kórið av eitt nú politikarum, ið leggja eftir teimum, ið arbeiða í almennu umsitingini. Hetta er ein ringur máti at byrja uppá, men tað skal samstundis ikki forða okkum í at samstarva við hann. Hetta er kanska sagt í einum valrúsi, so eg veit ikki, um tað bert skal síggjast sum valstríð. Men tað er langt úti, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

Gunnleivur heldur útsøgnirnar hjá Jan Højgaard vera á sera lágum plani, serliga tí, at nógvar av teimum skipanum, ið fiskimenn nýta gott av, verða væl umsitnar av fólki í almennu umsitingini.

- Vit hoyrdu í morgun fráfarandi formannin Óla Jacobsen greiða frá, at skattaskipanin hjá fiskimonnum var størsta frambrotið í hansara tíð sum formaður. Eg kann heilsa Jan, at óansæð um man er samdur í hesi skipan ella ikki, so er hon væl umsitin av júst fólkum í almennu umsitingini. Hetta er sum at hoyra ávísar politikarar, ið órevsaðir bera tílíkt fram á tingsins røðarapalli, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

# Meinti ikki øll almenn starvsfólk

**Hóast Jan Højgaard m.a. í lesarabrævi skrivar, at aðalstýrini eru nyttuleys, so heldur hann ikki, at hetta er ein atfinning móti almennum starvsfólki sum heild.**

FAKFELØG
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*


Jan Højgaard, nýggi formaðurin í Fiskimannafelagnum

Nýggi formaðurin í Fiskimannafelagnum, Jan Højgaard vísir aftur, at hansara lesarabræv 10. januar var meint sum ein atfinning móti almennum starvsfólki sum heild.

- Hetta var bert ein atfinning móti teimum, ið kalla seg frøðingar uttan at vera tað. Hesi sum føra fram at miðfyrisitingin skal styrkjast. Eg meini ikki, at miðfyrisitingin skal styrkjast. Fiskimaðurin hevur ikki fingið tað betur, arbeiðsmaðurin hevur ikki fingið tað betur, sigur Jan Højgaard.

Hóast atfinningarnar hjá formanninum í Fiskimannafelagnum vóru harðar, og hann millum annað kallar aðalstýrini fyri nyttuleys, so er hann eins og formaðurin í Starvsmannafelagnum opin fyri samstarvi.

- Vit koma ongan veg uttan samstarv, so sjálvandi ætli eg at samstarva við hini fakfeløgini.

Jan Højgaard er heldur ikki samdur við fráfarandi formanninum, Óla Jacobsen, at skattalættin til sjófólkið er størsta frambrotið fyri fiskimannin. Hann heldur, at Skattaskipanin er førging fyri, at fiskimaðurin fær veruliga trygging og nógv annað. Hann sigur tó, at hann ongar ætlanir hevur um at virka fyri at avtaka skipanina. Ístaðin fyri vil hann kunnað Føroya fólk um, at skipanin ikki er eitt tílíkt gávuborð, ið nógv halda.

- Tann mátin skipanin er lýst er so einsíðis, at tað er neyðugt at kunna tey um, hvussu hetta hongur saman í veruleikanum, sigur Jan Højgaard.

Hotel Hafnia ****
Gistingarhúsið í miðbýnum
HOTEL HAFNIA
Hafnia Lounge
UNPLUGGED
Leygarkvøldið 3. februar kl. 22:30
Eyðun & Neil

Opið er:
mánadag - leygardag frá kl. 14.00
sunnudag frá kl. 17.00
ÁARVEGUR 4-10 · POSTBOKS 107 · FO-110 TÓRSHAVN
TELEFON 31 32 33 · FAX 31 52 50 · HAFNIA@HAFNIA.FO
WWW.HAFNIA.FO